# Ársfrágreiðing fyri 2005

## Endamálið

Vinnuframagrunnurin varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamálið við Vinnuframagrunnurin er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun, uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul.

Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan. Umframt nevnda virksemi umsitur Vinnuframgrunnurin eisini stuðulskipan til skipasmíð.

## Árið 2005

Vinnuframgrunnurin hevur í 2005 viðgjørt 40 umsóknir, harav 24 umsóknir vóru játtaðar. Í stuðli vóru veittar 4.699.000 krónur brutto, meðan 655.000 krónur eru afturførdar. Nettostuðulin var sostatt 4.044.000 krónur.

Rentuinntøkurnar vóru í 2005 1.023.000 krónur, samanborið við 1.285.000 krónur í 2004. Eginognin við árslok var 51.795.000 krónur, harav stovnsfæið er 43.364.000 krónur. Við árslok 2005 er skyldugur stuðul 2.147.000 krónur.

## Árini 2001- 2005

Vinnuframagrunnurin hevur árini 2001 til 2005 játtað tilsamans 25 milliónir krónur í stuðli, og býtið millum ymisku sløgini av stuðli hevur verið hetta:

| | |
|---|---|
| Marknaðarføring | 54 % |
| Vinnuframaátøk | 28 % |
| Menning av vørum og tænastum | 13 % |
| Aðrar vinnur | 5 % |

## Hagtøl

Játtaði stuðulin hjá grunninum hevur háttað seg soleiðis (í túsund krónum):




| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframaátøk | - | 2.722 | 1.672 | 1.605 | 1.100 | 7.099 |
| Menning | - | 643 | 158 | 809 | 1.561 | 3.171 |
| Marknaðarføring | 1.013 | 3.611 | 4.567 | 2.487 | 2.000 | 13.678 |
| Aðrar | - | 788 | 100 | 291 | 38 | 1.217 |
| | **1.013** | **7.764** | **6.497** | **5.192** | **4.699** | **25.165** |

Samlað fyri árini 2001-2005 hevur býti verið soleiðis millum ymisku sløgini av stuðli:

